# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er gleðiligt, at færri doyggja sum børn, men vit kunnu ikki góðtaka at missa 9,7 mió. børn um árið*
*(UNICEF)*

# Vilja hava dagbókina hjá Kate McCann

**Portugisiska løgreglan heldur, at dagbókin hjá Kate McCann kann avdúka, hvat hendi ta náttina, Madeleine hvarv**

- Løgreglan vil hava dagbókina útflýggjaða fyri at vita, um nakað er har, sum kann avdúka tað, sum veruliga hendi ta náttina, siga vælvitandi keldur við bretska blaðið Evening Standard.

Fyrradagin vistu bretskir fjølmiðlar at siga, at løgreglan hevði biðið um at fáa ein persónligan lut hjá McCann-hjúnunum útflýggjaðan, men tað var ikki greitt, hvat fyri lut talan var um. Men í gjárkvøldið skrivaðu Daily Mail og Evening Standard, at løgreglan hevur biðið ein dómara áleggja Kate McCann at útflýggja sína dagbók.

Ákæruvaldið í Portugal kannar í løtuni eina frágreiðing frá løgregluni, og niðurstøðan hjá ákæruvaldinum verður avgerandi fyri, um McCann-hjúnini verða sett í varðhald. Roknað verður við, at avgerðin kemur í hesari vikuni, skrivar Reuters.



*Kate Mc Cann. Løgreglan heldur, at dagbók hennara kann avdúka sannleikan*

# Færri doyggja sum børn

**Talið á teimum, sum doyggja, áðrenn tey hava fylt fimm ár, minkar støðugt. Men talið er framvegis óhugnaliga stórt**

Framvegis eru tað óhugnaliga nógv børn, sum doyggja, áðrenn tey røkka fimm ára aldri. Sambært ST-stovninum UNICEF doyðu 9,7 mió. børn ymsastaðni kring heimin í fjør, og hóast talið er óhugnaliga stórt, var tað væl minni enn í 1990, tá 13 mió. børn doyðu, áðrenn tey fyltu fimm.

UNICEF fegnast um, at færri børn doyggja, men stovnurin ásannar samstundis, at altjóða samfelagið er langt frá tí máli, sum tað hevur sett sær. Eftir málsetninginum skuldi talið á børnum, sum doyggja innan fimm ára aldur, minka niður í ein triðing frá 1990 til 2015, men við verandi gongd ber ikki til at røkka hesum máli fyrr enn í 2045, sigur UNICEF.

- Vit kunnu ikki góðtaka at missa 9,7 mió. børn á hvørjum ári, og tey flestu børnini doyggja av ávum, sum vit kundu fyribyrgt, um foreldrini høvdu atgongd til heilsuhjálp og vaksinasjón, sigur aðalskrivarin hjá UNICEF í Danmark, Steen M. Andersen, við danska útvarpið.

Tølini hjá ST-stovninum vísa, at 4,8 mió. børn í Afrika doyðu í fjør, og at ringast stendur til í londunum í Vestur- og Miðafrika. Støðan er eisini ring í Suðurasia, har 3,1 mió. børn doyðu í fjør, áðrenn tey fyltu fimm, sigur UNICEF.

# Fyrrverandi sjónvarpsstjørna á odda í USA

**Fred Thompson er best umtókta forsetavalevnið hjá republikanarunum**

Í síðstu viku kunngjørdi fyrrverandi sjónvarpsstjørnan Fred Thompson, at hann ætlaði sær at royna at gerast forsetavalevni hjá republikanska flokkinum, og longu nú er hann fremstur av teimum republikonsku avbjóðarunum.

Í einari kanning, sum sjónvarpið CNN hevur gjørt, siga 27 prosent av teimum republikonsku veljarunum, at tey vilja hava flokkin at stilla Fred Thompson upp á forsetavalinum næsta heyst. Beint í hølunum á honum kemur fyrrverandi borgarstjórin í New York, Rudolph Giuliani, við 26 prosentum, men hetta er fyrstu ferð, at Giuliani ikki er fremstur í kanningunum.

Kanningin hjá CNN vísir, at tað eru serliga menn, sum eru farnir um tey fimmti, sum styðja Fred Thompson.

## STUTT SAGT

### Mugu telja umaftur

Eitt brek við maskinuni, sum taldi atkvøðurnar á kommunuvalinum í Stavanger, Sandvik og Sola fyrr í vikuni ger, at atkvøðurnar mugu teljast umaftur. Valnevndin væntar ikki, at umteljingin fer at broyta úrslitið hjá teimum einstøku listunum stórvegis, men hinvegin fer umteljingin uttan iva at broyta manningina í teimum trimum kommunustýrunum, sigur valnevndin. Maskinan, sum bleiv brúkt til at telja atkvøðurnar, er brúkt fyrr, men nú vil valnevndin hava vissu fyri, at maskinan virkar, sum hon skal, áðrenn val verður aftur, skrivar Aftenposten.

### Fáa frí til at gera børn

Í russiska landspartinum Ulyanovsk koma so fá børn í verðina, at tað er vorðið ein stórur trupulleiki fyri lokalsamfelagið. Men nú hava myndugleikarnir valt at ganga heilt nýggjar leiðir fyri at loysa trupulleikan. So í gjár fingu fólk frí frá arbeiði, so tey kundu hugna sær í songini heima við hús, skrivar BBC. Eydnast tað hjá onkrum, og er tað so heppið, at úrslitið sær dagsins ljós um júst níggju mánaðir, kunnu foreldrini vænta at fáa samsýning. Tí 12. juni er tjóðardagur í Russlandi, og tey hepnu foreldrini kunnu tá fáa bil, kuldaskáp ella pengar í virðisløn, sigur BBC.

### Skotar fagna Íslandi

Í Skotlandi eru politikararnir fegnir um, at íslendska stjórnin hevur sýtt fyri at lata hvalabátarnar sleppa at skjóta fleiri stórhvalir til vinnuligt endamál. Stjórnin tók avgerðina við teirri grundgeving, at áhugin fyri stórhvalatvøsti er so lítil. Hetta hóvar skotsku politikarunum væl, nú teir viðgera eitt uppskot til samtyktar um at heita á Ísland, Japan og Noreg um at virða altjóða bannið ímóti vinnuligari stórhvalaveiði.